# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Tað kundi blivið kríggj inni í rúminum*

*Terry Butcher*

# Rodrigo til Ukraina

**Nú er endaliga greitt, hvar Rodrigo spælur komandi tíðina. Fyrrverandi KÍ-framherjin skiftir til ukrainskan fótbólt**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- Ja, eg havi fingið sáttmála í Ukraina, og tað eri eg sera fegin um. Venjarin hevur sýnt mær stórt álit, og eg eri spentur upp á uppgávuna.

Tað hevur verið greitt í longri tíð, og nú er tað endaliga staðfest. Brasilski Rodrigo spælir ikki í Formuladeildini í komandi kappingarári.

Fjepparasíðan hjá KÍ, blaabylgjan.com, skrivar, at Rodrigo hevur gjørt avtalu við FC Karpaty Lviv, sum í løtuni liggur nummar níggju í bestu ukreinsku deildini. Sáttmálin er galdandi í trý ár.

Rodrigo kom til KÍ undan kappingarárinum í ár, og við 11 málum var hann greiður toppskjútti hjá klaksvíkingum, sum gjørdust nummar 8 í Formuladeildini.



*Rodrigo Silva fer nú at royna seg í Ukrainskum fótbólti, har hann hevur gjørt sáttmála við FC Karpaty Lviv í bestu deildini*

# Sam var skjótastur um Agnið

**Fyrsta umfarið í vetrarkappingini í renning var um vikuskiftið, tá menn og kvinnur runnu runt Agnið við Toftir**

RENNING
*Tíðindaskriv*

31 fólk luttóku í fyrsta umfari av vetrarkappingini í renning á Toftum leygardagin. Tey vaksnu byrjaðu við Tofta skúla og runnu 10,5 km langa teinin Runt Agnið. Børnini byrjaðu við Toftavatn og runnu fimm kilometrar út á Toftir.

Líkindini vóru skiftandi. Nakað av vindi var høgt og okkurt æl var á vegnum eisini.

Hjá dreingjunum gjørdust Rúni Seloy, Regin Joensen og Tráin Petursson ávikavist nummar eitt, tvey og trý. Hjá gentunum vann Rebekka Fuglø.

Hjá kvinnunum vann Bjørk Herup Olsen frammanfyri Rannvu Djurholm og Fríðunn Steinberg. Bjørk og Rannvá gjørdust eisini nummar 1 og 2 í bólkinum fyri kvinnuunglingar. Eyð Matras vann bólkin fyri veterankvinnur.

Størsti spenningurin varð ivaleyst í kappingini hjá monnum. Eftir eina javna byrjan, har fleiri rennarar stríddust í oddinum, eydnaðist tað Sam Vang og Guttorm Sørensen at gerast nummar eitt og tvey. Andrias Hansen gjørdist nummar trý. Jan Elmar Sørensen vann bólkin fyri mansunglingar, meðan Pól Sundskarð, Tummas Joensen og Bogi Gardar gjørdust nummar eitt, tvey og trý hjá mansveteranunum. Fyrstu trý plássini í bólkinum fyri superveteranar fingu Óli Olsen, Jens Weihe og Regin Jóanesarson.




*Fyrsta umfarið í vetrarkappingini í renning var á skránni leygardagin*

## Vil ikki fyrigeva Maradona

**Hjálparvenjarin hjá skotska landsliðnum, Terry Butcher sigur seg ikki kunna gloyma óregluliga málið, sum Maradona skoraði í 1986**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Í annaðkvøld skal Diego Maradona á fyrsta sinni standa á odda fyri argentinska landsliðnum, sum landsliðsvenjari, tá Argentina og Skotland spæla venjingardyst á Hampden Park í Glasgow.

Hjálparvenjarin hjá Skotlandi, fyrrverandi enski landsliðsskiparin, Terry Butcher hevur ikki fyrigivið Diego Maradona, fyri at hesin skoraði eitt óregluligt mál ímóti Onglandi í fjórðingsfinaluni undir HM-endaspælinum í Mexico í 1986. Tá skoraði Maradona tiltikna málið við »Guds hond«, sum hann sjálvur tók til aftaná dystin, sum Argentina vann 2-1.

- Tað kendist ikki væl at tapa ein dyst á ein slíkan hátt. Eg og tveir liðfelagar vóru útvaldir til dopingroyndina eftir dystin. Maradona, og tveir aðrir vóru valdir fyri Argentina. Tað kundi blivið kríggj inni í rúminum. Men tað var ein ávís fjarstøða ímillum okkum. Hevði tað ikki verið tað, so hevði kanska givið honum ein umgang, sigur skotski hjálparvenjarin, Terry Butcher.

Hann sigur, at tað er sera trupult at fyrigeva Maradona fyri tað óregluliga málið, sum varð skorað fyri 22 árum síðani.

Ongland vann dystin 2-1, og meðan fyrra málið hjá Maradona var óregluligt, so verður málið til 2-0 standandi sum eitt tað vakrasta minnið í HM-søguni yvirhøvur.



*Lítli Maradona rætti hondina upp, og so var hann brádliga hægri enn Peter Shilton í enska málinum*